# Uppmáting av vøtnum í Føroyum*)

*Sigmund í Dali*

Í greinum um uppmáting av vøtnum í Føroyum (í *Dali* 1975, 1977) varð sagt frá uppmátingarháttinum, og ætlanini um at kanna nøkur vøtn uppi millum fjalla.

Her verða framløgd uppmátingarúrslitini av Vatndalsvatni, Hvilvtkinnavatni, Kirkjuvatni, Gásavatni, Vatninum í Skælingsskarði, Porkerisvatni og Kvíandalsvatni.

Uppmátingarhátturin er ikki broyttur munandi, men fyri at lætta um dragslið er plastbáturin avloystur av einum plastfari, sum kann blásast upp.

Í greinini um uppmáting av vøtnum í Føroyum (í *Dali* 1977) vóru vøtnini, sum vórðu avbyrgd til vatnorkugoymslur, nevnd. Síðan eru fleiri vøtn tikin til matarvatnsgoymslur, og kunnu vit vænta at alt fleiri verða nýtt á hendan hátt ella tikin til vatnorkugoymslur. Áhugin fyri vøtnunum er vorðin størri og tørvurin á kunnleika um tey alt vaksandi. Framvegis má tí dentur verða lagdur á at máta upp tey vøtn, sum ætlanin er at taka í nýtslu, áðrenn ov stórar broytingar fara fram av mannaávum.

## *Vatndalsvatn (1. mynd)*

Vatndalsvatn liggur í Vágum, á Bíggjarfjøllum, í Vatnsdali, á markinum millum Bø og Sørvág. Á mátiborðsblað nr. 24 er vatnið merkt at liggja 302 m o. sj. Vatnið er um 350 m langt og um 160 m breitt. Strondin er jøvn. Vatnið hevur ivaleyst

*) Føroya Jarðfrøðisavn og Danmarks Geologiske Undersøgelse.

verið meira rundleitt fyrr, men sandoyrin norðanfyri hevur stungið seg út í vatnið, so tað nú er meinlíkt einum nýra. Frá rennur suðureftir. Størsta mátaða dýpið er 22 m.

1. talva *Vatndalsvatn*

| m úr landi<br>m from the shore | 1. teinur, dýpi m<br>1. route, depth m | 2. teinur, dýpi m<br>2. route, depth m | 3. teinur, dýpi m<br>3. route, depth m | 4. teinur, dýpi m<br>4. route, depth m | 5. teinur, dýpi m<br>5. route, depth m |
|---|---|---|---|---|---|
| 25 | 5.5 | 3.0 | 3.5 | 1.0 | 9.5 |
| 50 | 16.0 | 11.0 | 12.5 | 5.5 | 13.0 |
| 75 | 21.0 | 17.0 | 18.0 | 12.0 | 18.0 |
| 100 | 22.0 | 14.0 | 19.0 | 15.0 | 21.0 |
| 125 | 17.0 | 15.5 | 21.0 | 16.0 | 22.0 |
| 150 | 8.0 | 15.5 | 21.0 | 14.0 | 21.0 |
| 160 | 0.0 | | | | |
| 175 | | 14.0 | 15.0 | 11.0 | 19.0 |
| 200 | | 12.5 | 11.5 | 7.0 | 20.0 |
| 215 | | | 0.0 | | |
| 220 | | 0.0 | | | |
| 225 | | | | 0.0 | 18.0 |
| 250 | | | | | 18.0 |
| 275 | | | | | 15.5 |
| 300 | | | | | 14.0 |
| 325 | | | | | 9.5 |
| 345 | | | | | 0.0 |


5
10
15
20
22,0
1.
2.
3.
4.
5.
VATNDALSVATN
VÁGAR
5 M MILLUM DÝPDARSTRIKURNAR
5 M BETWEEN CONTOUR LINES
0 100 200 M

1. mynd

### *Hvilvtkinnavatn (2. mynd)*

Hvilvtkinnavatn liggur í Vágum, sunnanvert við Víkar. Eftir mátiborðsblað nr. 24 er tað um 214 m o. sj. Fleiri áir og løkir renna í vatnið. Frá rennur norðureftir í Reipsá.

Vatnið er um 225 m langt og um 200 m breitt. Av kortinum (2. mynd) sæst at vatnið er grunt norðantil, men dýpið veksur suðureftir og minkar síðan bratt inn at oyrini. Størst mátað dýpi er 7.0 m.

2. talva *Hvilvtkinnavatn*

| m úr landi<br>m from the shore | 1. teinur, dýpi m<br>1. route, depth m | 2. teinur, dýpi m<br>2. route, depth m | 3. teinur, dýpi m<br>3. route, depth m | 4. teinur, dýpi m<br>4. route, depth m | 5. teinur, dýpi m<br>5. route, depth m | 6. teinur, dýpi m<br>6. route, depth m |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 5 | 0.5 | 0.5 | 0.5 | 0.3 | 0.4 | 0.2 |
| 10 | 0.6 | 0.9 | 0.7 | 0.3 | 2.0 | 2.3 |
| 15 | 0.9 | 1.0 | 0.9 | 0.5 | 3.0 | 2.6 |
| 20 | 1.0 | 1.0 | 0.9 | 0.7 | 3.0 | 3.0 |
| 25 | 1.3 | 1.0 | 0.9 | 0.7 | 3.3 | 3.2 |
| 50 | 1.3 | 1.2 | 1.2 | 1.0 | 3.5 | 4.3 |
| 75 | 1.3 | 1.3 | 4.2 | 3.5 | 4.0 | 6.0 |
| 100 | 1.2 | 2.0 | 6.5 | 4.4 | 4.0 | 6.7 |
| 125 | 0.0 | 1.8 | 7.0 | 5.8 | 3.5 | 6.5 |
| 135 | | | | 0.0 | | |
| 150 | | 0.5 | 6.5 | | 3.0 | 5.4 |
| 160 | | 0.0 | | | | |
| 175 | | | 0.4 | | 2.2 | 0.0 |
| 185 | | | 0.0 | | | |
| 200 | | | | | 1.0 | |
| 225 | | | | | 0.0 | |


HVILVTKINNAVATN
VÁGAR
1 M MILLUM DÝPDARSTRIKURNAR
1 M BETWEEN CONTOUR LINES
0 100 200 M

2. mynd

## *Kirkjuvatn (3. mynd)*

Kirkjuvatn liggur í Suðuroy, tætt norðan fyri Fámjin. Á mátiborðsblað nr. 47 er vatnið merkt at liggja 93 m o. sj.

Vatnið liggur í einum botni. Frá rennur suðureftir. Vatnið er um 500 m langt og um 400 m breitt. Av kortinum (3. mynd) sæst, at tað dýpist meira líðandi eystantil á vatninum enn vestantil. Størst mátað dýpi er 25 m.

3. talva *Kirkjuvatn*

| m úr landi<br>m from the shore | 1. teinur, dýpi m<br>1. route, depth m | 2. teinur, dýpi m<br>2. route, depth m | 3. teinur, dýpi m<br>3. route, depth m | 4. teinur, dýpi m<br>4. route, depth m |
|---|---|---|---|---|
| 25 | 5.0 | 10.0 | 9.5 | 3.5 |
| 50 | 13.0 | 14.5 | 15.0 | 4.0 |
| 75 | 14.8 | 17.5 | 17.0 | 10.0 |
| 100 | 16.0 | 18.2 | 19.5 | 12.0 |
| 125 | 16.5 | 18.4 | 19.0 | 13.5 |
| 150 | 14.5 | 18.6 | 20.0 | 15.0 |
| 175 | 12.0 | 24.0 | 18.5 | 9.0 |
| 200 | 11.5 | 24.0 | 15.0 | 5.0 |
| 225 | 16.0 | 24.0 | 15.0 | 3.0 |
| 250 | 12.0 | 25.0 | 14.5 | 2.75 |
| 275 | 0.0 | 24.0 | 13.5 | 2.5 |
| 300 | | 23.0 | 11.5 | 2.2 |
| 325 | | 19.0 | 8.0 | 0.0 |
| 350 | | 15.5 | 3.5 | |
| 365 | | | 0.0 | |
| 375 | | 1.5 | | |
| 395 | | 0.0 | | |


25,0
2
20
3
15
10
5
4
KIRKJUVATN
SUÐUROY
5M MILLUM DÝPDARSTRIKURNAR
5M BETWEEN CONTOUR LINES
0 100 200 M

3. mynd

*Gásavatn (4. mynd)*

Gásavatn liggur í Dalahaga millum Vestmanna og Saksun. Á mátiborðsblað nr. 11 er vatnið merkt at liggja 358 m o. sj. Vatnið er 400 m langt og har tað er breiðast um 120 m. Strondin er jøvn. Bert fáir løkir renna í vatnið. Frá rennur eystureftir. Størst mátað dýpi er 11.0 m.

4. talva *Gásavatn*

| m úr landi<br>m from the shore | 1. teinur, dýpi m<br>1. route, depth m | 2. teinur, dýpi m<br>2. route, depth m | 3. teinur, dýpi m<br>3. route, depth m | 4. teinur, dýpi m<br>4. route, depth m | 5. teinur, dýpi m<br>5. route, depth m |
|---|---|---|---|---|---|
| 5 | 1.0 | 1.2 | 1.0 | 4.0 | 2.7 |
| 10 | 4.5 | 4.0 | 3.5 | 7.0 | 5.0 |
| 15 | 5.4 | 5.0 | 5.3 | 8.5 | 7.5 |
| 20 | 6.0 | 5.0 | 6.0 | 9.0 | 8.0 |
| 25 | 6.7 | 6.0 | 6.5 | 9.5 | 8.0 |
| 30 | | | | 10.2 | 7.5 |
| 35 | | | | 10.6 | 5.0 |
| 40 | | | | 11.0 | 0.0 |
| 45 | | | | 10.5 | |
| 50 | 9.0 | 7.5 | 8.4 | 10.0 | |
| 55 | | | | 10.0 | |
| 60 | | | | 9.5 | |
| 65 | | | | 9.5 | |
| 70 | | | | 9.0 | |
| 75 | 9.5 | 3.2 | 8.3 | 7.0 | |
| 80 | | | | 4.0 | |
| 85 | | | | 0.0 | |
| 100 | 9.0 | 2.0 | 8.5 | | |
| 125 | 9.7 | 4.0 | 8.0 | | |
| 150 | 10.5 | 6.0 | 0.0 | | |
| 175 | 11.0 | 0.0 | | | |
| 200 | 10.0 | | | | |
| 225 | 7.0 | | | | |
| 250 | 6.0 | | | | |
| 275 | 6.5 | | | | |
| 300 | 6.0 | | | | |
| 325 | 3.5 | | | | |
| 350 | 3.0 | | | | |
| 375 | 1.0 | | | | |
| 400 | 0.0 | | | | |


GÁSAVATN
STREYMOY
5 M MILLUM DÝPDARSTRIKURNAR
5 M BETWEEN CONTOUR LINES
0 50 100 M
11.0
10
5
1.
2.
3
4.
5.

4. mynd

### *Vatnið á Skælingsskarði (5. mynd)*

Vatnið liggur á Streymoynni, í skarðinum millum Skælingsfjall og Sátuna. Á mátiborðsblað nr. 26 er vatnið merkt at liggja 238 m o. sj. Bert smáir løkar renna í vatnið. Frá rennur vestureftir.

Vatnið er um 150 m langt og um 100 m breitt. Av kortinum (5. mynd) sæst, at tað dýpist skjótari eystantil á vatninum enn vestantil. Størst mátað dýpi er 4,5 m.

5. talva *Vatnið á Skælingsskarði*

| m úr landi<br>m from the shore | 1. teinur, dýpi m<br>1. route, depth m | 2. teinur, dýpi m<br>2. route, depth m | 3. teinur, dýpi m<br>3. route, depth m |
|---|---|---|---|
| 25 | 0.75 | 1.2 | 1.5 |
| 50 | 1.50 | 1.5 | 2.0 |
| 75 | 2.0 | 3.2 | 4.5 |
| 100 | 4.5 | 2.7 | 3.5 |
| 125 | 3.5 | 1.2 | 0.5 |
| 135 | | 0.0 | 0.0 |
| 150 | 0.0 | | |


VATNIÐ Í SKÆLINGSSKARÐI
STREYMOY
1M MILLUM DÝPDARSTRIKURNAR
1M BETWEEN CONTOUR LINES
0 50 100 M

5. mynd

### *Porkerisvatn (6. mynd)*

Porkerisvatn liggur á Kirkjubøreyni við gøtuna millum Kirkjubø og Argir. Á mátiborðsblað nr. 35 er vatnið merkt at liggja um 245 m o. sj. Vatnið er 220 m langt, og har tað er breiðast 110 m. Strondin er jøvn. Vatnið er javnt djúpt um ½ m. Størst mátað dýpi er 0.6 m. Bert smáir løkir renna í vatnið. Frá rennur suðureftir.

6. talva *Porkerisvatn*

| m úr landi m from the shore | 1. teinur, dýpi m 1. route, depth m | 2. teinur, dýpi m 2. route, depth m | 3. teinur, dýpi m 3. route, depth m | 4. teinur, dýpi m 4. route, depth m | 5. teinur, dýpi m 5. route, depth m |
|---|---|---|---|---|---|
| 5 | 0.5 | 0.5 | 0.5 | 0.5 | 0.3 |
| 10 | 0.5 | 0.5 | 0.5 | 0.5 | 0.5 |
| 15 | 0.5 | 0.5 | 0.5 | 0.5 | 0.5 |
| 20 | 0.5 | 0.5 | 0.6 | 0.5 | 0.5 |
| 25 | 0.5 | 0.5 | 0.6 | 0.5 | 0.5 |
| 30 | | | 0.6 | | |
| 35 | | | 0.6 | | |
| 50 | 0.6 | 0.5 | 0.5 | 0.5 | 0.5 |
| 65 | | | | 0.5 | |
| 75 | 0.5 | 0.5 | 0.4 | | 0.5 |
| 95 | 0.5 | | | | |
| 100 | | 0.4 | 0.4 | | 0.3 |
| 110 | | | 0.3 | | |
| 125 | | | | | 0.3 |


5.
0,3
0,5
4.
0,5
0,5
0,5
0,5
0,6
0,5
0,5
0,5
0,4
0,5
0,6
3.
0,5
0,5
2.
1.
PORKERISVATN
STREYMOY
0 50 100 M

6. mynd

## *Kvíandalsvatn (7. mynd)*

Kvíandalsvatn liggur í Eysturoynni, undir Miðafelli eystan fyri Funningsfjørð. Á mátiborðsblað nr. 12 er vatnið merkt at liggja 324 m o. sj. Strondin er jøvn. Bert smáir løkir renna í vatnið. Frá rennur eystureftir. Vatnið er um 240 m langt og um 100 m breitt. Størst mátað dýpi er 9.0 m.

7. talva *Kvíandalsvatn*

| m úr landi<br>m from the shore | 1. teinur, dýpi m<br>1. route, depth m | 2. teinur, dýpi m<br>2. route, depth m | 3. teinur, dýpi m<br>3. route, depth m | 4. teinur, dýpi m<br>4. route, depth m | 5. teinur, dýpi m<br>5. route, depth m | 6. teinur, dýpi m<br>6. route, depth m |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 5 | 0.5 | 0.7 | 1.3 | 1.5 | 1.4 | |
| 10 | 0.7 | 1.7 | 4.0 | 3.5 | 3.4 | |
| 15 | 1.0 | 3.6 | 5.5 | 5.5 | 4.5 | 0.7 |
| 20 | 2.7 | 4.5 | 6.2 | 5.5 | 5.0 | 0.7 |
| 25 | 3.5 | 5.4 | 6.3 | 5.0 | 5.0 | 1.8 |
| 50 | 3.5 | 8.5 | 9.0 | 7.7 | 4.0 | 3.2 |
| 75 | 2.7 | 5.5 | 8.0 | 5.5 | 1.0 | 2.0 |
| 90 | | | | | 0.0 | |
| 100 | 2.0 | 2.5 | 3.8 | 1.5 | | 1.8 |
| 105 | | 0.0 | | | | |
| 120 | | | 0.0 | 0.0 | | 0.0 |
| 125 | 0.8 | | | | | |
| 130 | 0.0 | | | | | |


5.
4.
2 4 6 8
9.0
3.
1.
6.
2.
KVÍANDALSVATN
EYSTUROY
2 M MILLUM DÝPDARSTRIKURNAR
2 M BETWEEN CONTOUR LINES
0 50 100 M

7. mynd

## BÓKMENTIR

1. *í Dali, Sigmund:* Uppmáting av vøtnum í Føroyum. Fróðskaparrit 23. bók bls. 63—76. Tórshavn 1975.
2. *í Dali, Sigmund:* Uppmáting av vøtnum í Føroyum. Fróðskaparrit 25. bók bls. 155—173. Tórshavn 1977.

## SUMMARY

The article is a continuation of a survey of Faroese lakes (S. í Dali 1975, 1977). The soundings were made with a Seafarer 3 (149 khz) echosounder. The work is still in progress.